UTTAN ÚR HEIMI

## Stjórnin verður umskipað

Alt bendir á, at norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, fer at umskipa stjórn sína í næstum.

Í norsku fjølmiðlunum verður nú dúgliga gitt, hvat broytingin fer at bera í sær. Hildið verður, at almannamálaráðharrin Ingjerd Schou kann ikki kenna seg serliga trygga í sínum stóli, og tað sama verður sagt um olju- og orkumálaráðharran Einar Steensnæs, fiskimálaráðharran Svein Gabrielsen og vinnumálaráðharran Ansgar Gabrielsen. Arbeiða- og umsitingarmálaráðharrin Victor D. Norman eigur heldur ikki at kenna seg tryggan, ahlda fjølmiðlarnir.

Tað var forsætisráðharrin sjálvur, sum kom við ábendingini um, at hann fer at umskipa stjórnina. Í einari samrøðu við norska TV2 týakvøldið segði Bondevik, at tað er lítið hugsandi, at allir ráðharrarnir verða sitandi alt valskeiðið.

## Hava rætt til endurgjald

Suðurafrikanski erkabiskuppurin Desmond Tutu heldur, at fólk, sum gjørdust offur fyri apartheid-stýrinum, hava rætt til endurgjald frá fyritøkum, sum fingu ágóða av politikkinum hjá tí hvíta minnilutastýrinum.

Ein amerikanskur sakførari hevur vegna fleiri suðurafrikanarar reist endurgjaldskrav ímóti fleiri stórfyritøkum so sum Anglo American, General Motors, Barkleys og IBM. Desmond Tutu heldur, at málið kundi verið loyst uttan um rættarverkið, og hann finst at fyritøkunum í tí sambandi. Biskuppurin vísir á, at undir apartheid-stýrinum noyddust nógvir svartir menn at fara frá konu og børnum fyri at arbeiða sum bílig arbeiðsmegi hjá teimum stóru fyritøkunum.

Suðurafrikanska stjórnin tekur ikki undir við sakarmálinum. Thabo Mbeki, forseti, hevur ístaðin skotið upp, at tey 22.000, sum siga seg hava verið offur fyri politikkinum hjá apartheid-stýrinum, skulu fáa endurgjald frá tí almenna. Uppskotið er, at tey fáa 30.000 krónur í part.

## Hann myrdi Pearl

Amerikanskir myndugleikar halda, at tað var Khalid Sheikh Mohammed, sum myrdi amerikanska tíðindamannin Daniel Pearl fyri hálvum øðrum ári síðani. Tað skrivar blaðið Wall Street Journal, sum Daniel Pearl arbeiddi hjá.

Khalid Sheikh Mohammed verður hildin at hava verið ein av næstu monnum bin Ladens í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda. Hann varð tikin í Pakistan í mars og hevur síðani siti fagni á einum loyniligum staði.

Daniel Pearl varð burturfluttur í Karachi í Pakistan í januar í fjør. Ein mánað seinni fekk amerikanska umboðsstovan í býnum eina sjónbandsupptøku, sum vísti, at tíðindamaðurin var avrættaður, og í mai varð líkið av honum funnið. Í summar vórðu fýra menn dømdir fyri at hava verið uppi í morðinum. Undir rættarmálinum kom kortini fram, at teir vóru ikki hjástaddir, tá Daniel Pearl varð myrdur.

## Hørð kapping

Tey stóru flogfeløgini fáa altsamt harðari kapping frá teimum sonevndu lágprísfeløgunum.

Tað noyðist SAS eisini at sanna, og í gjár boðaði felagið frá, at tað fer at lække ferðaseðlaprísin á summum rutum 20 prosent í næstu viku. Í hesum umfarinum er tað serliga tann komandi kappingin frá felagnum Nordic Airlink, sum noyðir SAS at lække prísin. Nordic Airlink fer at flúgva millum Oslo og Stockholm og millum Keypmannahavn og Stockholm í næstum, og prísirnir, sum felagið hevur kunngjørt, eru væl lægri enn teir hjá SAS.

Sture Stølen, stjóri í SAS, sigur við Jyllandspostin, at felagið ætlar at verja sína støðu á marknaðinum, og at felagið tí er til reiðar at seta prísin uppaftur longri niður, gerst tað neyðugt.

# Amerikanski herurin nýtir óneyðugan harðskap í Irak



*Mynd: Reuters*

**Ein umfatandi frágreiðing hjá mannarættindafelagsskapin um Human Rights Watch vísir, at amerikanski herurin nýtir óneyðugan harðskap í Irak**

IRAK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Týsdagin gingu starvsfólk hjá irakska stjórnarráðnum mótmælisgongu í Bagdad, har tey mótmæltu framferðini hjá amerikonsku hermonnunum. Tað ger tann viðurkendi mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch eisini.

- Tað er ein sorgarleikur, at teir amerikonsku hermenninir drepa so mong sivilfólk í Bagdad, og tað er ófatiligt, at amerikanska herleiðslan als ikki fylgir við hesum, og at hon ikki kannar umstøðurnar, sigur talsmaðurin hjá Human Rights Watch, Joe Stork.

Felagsskapurin sigur í sínari seinastu frágreiðing, at teir amerikonsku hermenninir hava dripið 94 sivilfólk í Bagdad undir umstøðum, sum áttu at gjørt, at tilburðirnir vórðu kannaðir. Higartil hevur herleiðslan bert kannað fimm av tilburðunum. Í fýra førum var niðurstøðan, at hermenninir høvdu hildið seg innan fyri karmarnar, og í tí fimta førinum fingu tveir hermenn eina átalu.

Human Rights Watch hevur av sínum eintingum kannað hinar fýra tilburðirnar, og felagsskapurin sigur ongan iva vera um, at teir amerikonsku hermenninir nýttu óneyðuga harðrenda framferð øllum fýra førunum. Í tí eina førinum skutu hermenninir ein irakskan mann, sjálvt um hann var óvápnaður og hevði hendurnar oman fyri høvdið, og í einum øðrum føri varð hann maður illa bukaður, eftir at hermenninir høvdu tikið hann.

Human Rights Watch vísir í frágreiðingini á, at teir amerikonsku hermenninir hava ikki venjing sum løgreglumenn, og at teir tí ikki duga at arbeiða sum slíkir. Sagt verður, at fleiri deildir eggja sínum hermonnum til at fara hóvliga fram, og at fleiri herleiðarar eru ørkymlaðir av framferðini hjá hermonnunum.

# Noktaðu sjúklingi hjálp

**Russisku myndugleikarnir noktaðu at hjálpa einari kvinnu, sum bleiv sjúk umborð á einum SAS-flogfari, meðan tað fleyg yvir russiskum øki**

RUSSLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Flogfarið var á veg úr Bangkok til Keypmannahavnar, tá ein kvinna av teilendskum uppruna gjørdist sjúk. Flogfarið var í russiskum loftrúmi, og flogskiparin gjørdi av at lenda í Moskva, so kvinnan kundi fáa hjálp.

Í floghavnini kom ein russiskur lækni umborð á flogfarið. Men tvey umboð fyri myndugleikarnar komu eisini umborð á flogfarið, og teir sýttu fyri at lata kvinnuna sleppa á sjúkrahús, tí hon hevði ikki innferðarloyvi. Sambært SAS vildu hægri myndugleikar heldur ikki hjálpa kvinnuni.

Tískil noyddist flogfarið avstaðaftur. Í Keypmannahavn varð kvinnan alt fyri eitt flutt á sjúkrahús.

SAS sigur, at felagið ætlar sær ikki at góðtaka framferðina hjá russisku myndugleikunum, og at málið verður tikið upp á hægri staði.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ebba Adam í Klakvík 80 ár



Týsdagin 21. oktober fylti Ebba Adam í Klaksvík 80 ár. Ebba, sum er ættað úr Søldarfirði og avgjørt hoyrir til tey stillu í landinum, hevur búð á Gerðareiði í Klaksvík síðani stutt eftir 2. heimsbardaga. Hon býr framvegis í heiminum, sum hon og maðurin bygdu í Kráargøtu, sum vegurin hevur verið nevndur eini 35 tey seinastu árini.

Elsebeth Kristina ella Ebba, sum hon altíð hevur verið nevnd, er úr Byrgi í Søldarfirði. Foreldrini vóru Hanna, sum var ættað úr Æðuvík og vaks upp í Byrginum, og Hans Marius Solmunde. Ebba var næstelst av fimm systkjum: Petur, sum búsettist í Noregi, Ebba, Jóhannus, sum býr í Søldarfirði, Sólarn, sum búsettist í Syðrugøtu og Jonnhild, sum býr í Søldarfirði.

Hanna doyði í 1933. Tá var hon bara 28 ára gomul. Hans Marius giftist uppaftur við Lenu Niclasen úr Sørvági, sum sat einkja í Søldarfirði. Hon hevði verið gift við beiggja Hans Marius, Sámal Peturi, sum fórst við Immanuel í 1932. Tá sat Lena sum 22 ára gomul einkja við trimum børnum – Oda og Arne, sum bæði búsettust í Klaksvík, og Hjørleif, sum búsettist á Tvøroyri. Lena og Hans Marius fingu fimm børn: Sámal Petur, sum búsettist í Noregi og doyði fyri stuttum, Ansa og Selma, sum búgva í Søldarfirði, Sofus, sum búði í Noregi og doyði ungur av vanlukku og Hasla, sum býr í Klaksvík. Í Byrginum hjá Lenu og Hans Mariusi vóru altso míni børn, tíni børn og okkara børn. Trettan í alt, og tey yngru vórðu fødd eftir at tey elstu vóru farin út.

Ebba giftist við Alan Andrew Adam, sum var skoti og bretskur hermaður í Søldarfirði undir krígnum. Tey bæði fingu tvær døtrar. Hanna og Janet, sum báðar búgva í Klaksvík.

Ebba og Alan Andrew arbeiddu bæði fisk hjá Kjølbro. Hann doyði í 1966, og nú eru tað fleiri ár síðani, at Ebba gavst at arbeiða. Í heiminum hjá teimum plagdu nógvir søldfirðingar at vitja og ferðast, og døtrarnar saman við familjunum hava verið nógv hjá Ebbu. Ikki minst tey fimm ommubørnini og kanska serliga Todi, sum Ebba við stórum áhuga fylgir, tá ið hann og FCK eru at síggja á onkrari sjónvarpsrás.

## Bjarni Skaalum 60 ár

Sunnudagin 19. oktober fylti Bjarni Skaalum á Argjum 60 ár. Bjarni er føddur í Keypmannahavn í 1943, sonur Astrid, f. Olsen, av Tvøroyri og Bjørgvin Skaalum, úr Vági. Bjarni búði á Tvøroyri, til hann sum 12 ára gamal kom út á Argir at búgva.



Hann tók lærarapróg á Føroya Læraraskúla í 1967 og var lærari á Sankta Frants Skúla í 30 ár, frá 1967-97. Á Sankta Frants Skúla var hann varaskúlastjóri frá 1973-80 og skúlastjóri frá 1980 til 1997, tá hann segði seg úr starvi og fór at rógva út. Síðan 1998 hevur hann verið lærari við Kvívíkar Skúla.

Hann var eina av stovnarunum og gittarspælari í væl umtókta orkestrinum frá 60-unum, Faroe Boys.

Bjarni er giftur við Finnbjørg, f. Joensen, úr Havn, tey eiga trý børn, sum øll búgva á Argjum: Bjørgvin, sum er elektrikari hjá Elmek, Tórun, sum hevur egna frisørsalong á Argjum, og Beinta, sum í løtuni gongur á lærataskúla.

Bjarna dámar væl at vera á floti og brúkar nógv av síni frítíð í bátinum, sum hann eigur saman við svágrinum.

## Sverri Djurhuus

**f. 11. juli 1920**
**d.18. oktober 2003**



Leygardagin 18. oktober andaðist Sverri Djurhuus í Havn, 83 ára gamal. Sverri var føddur 11. juni 1920 inni í Líð í Kollafirði, hann var næstelstur av teimum tíggju børnunum hjá Onnu Sofíu, f. Hansen, ættað úr Lon í Miðvági, og Olivar Djurhuus, úr Kollafirði. Sverri gekk í skúla í Kollafirði og fór sum 14 ára gamal til skips.

Á heysti 1939 fór hann til Danmarkar á Haandværkerhøjskolen í Haslev. Undir krígnum var hann í Danmark og í Týsklandi. Hann kom heim aftur til jóla í 1946. Eftir tað koyrdi hann hýruvogn í Havn, til hann í 1949 kom at arbeiða á bilverkstaðnum hjá Sigird av Reyni í Rættará. Í 1952 gjørdi hann sveinaroynd sum bilmekanikari og arbeiddi nógv ár í Rættará, har hann eisini hevði bilverkstað sjálvur. Hann hevði eisini bilverkstað í Janstovugøtu og í Hornabø.

Í desember 1970 fekk hann koyriloyvi á bilstøðini Auto í Havn og koyrdi har til 1993, tá hann mátti gevast, tí eyguni vóru farin at bila.

Sverri giftist í 1949 við Ingeborg, f. Olsen, av Deild í Vestmanna. Tey hava búð í Torfinsgøtu síðan 1955 og fingu fýra børn: Gunvør, Finnbjørn, sum doyði í 1972, bert 21 ára gamal, síðan eru tað Annmari og Rúna, sum báðar búgva í Danmark.

Sverri hevur í nógv ár fingist við at skriva, hann hevur skrivað onkrar stuttsøgur og givið út bøkur sum t.d. Lívsmyndir, sum kom út í 1979 og Lívið er eittans, sum kom út í 1983. Hann var tjóðveldismaður og skrivaði eisini greinar í 14. September. Eisini hevur hann latið inn áhugavert søguligt tilfar til áhugafelagið Føroya Ellisakfør um føroysku bilasøguna. Sverri var ein góður svimjari. Sum ungur fekk hann heiðursmerki fyri svimjikappingar í Havn, og hann hevði sína jøvnu gongd niðan í Svimjihøllina í Gundadali til fyri stuttum.

## Dagurin

**23. oktober. Severinus**, deyður umleið ár 400. Biskupur í Køln. Í Danmark er hann komin í bland við tann halga mannin Sørin í Ry í Jútlandi.
Latínskt navn, ið merkir *tann strangi* ella *álvarsami*.